# Tám

Eg andi djúpt inn. Føli kuldan skola niður í lunguni og drippa niður í kroppin. Eg steðgi ovast í andadráttinum og dráli, til eg føli prikan í bringuni, og tað einasta, eg hoyri, er hjartaslagið. Róliga, javna hjartaslagið. Eg lati eyguni upp, í tí eg sleppi ondini. Heita luftin úr munninum verður litað hvít, tá ið hon møtir køldu februarmorgunluftini. Eg verði eitt sindur kløkk av suffinum og hyggi rundan um meg fyri at vita, um nakar hoyrdi meg. Men eingin er her. Eingin er á kaiini so tíðliga á morgni. Tá ið eg vendi mær ímóti havinum aftur, er mín djúpi andadráttur, ið hekk so tungur í luftini, burtur. Ella ikki burtur. Fjaldur. Vorðin kaldur aftur. Eg hyggi upp til himmals, men røkki ikki langt, tí mjørkin hongur langt niður, og eg røkki næstan at nema við hann. Men bara næstan.

Mjørki kemur ongantíð so nær við meg. Hann kann koma sera nær og hongur tungt uttan um hús og heilar býir. Men hvørja ferð eg gangi inn í hann og vil føla frísku vatndroparnar á húðini, flytur hann seg. Lyftir og ger pláss fyri mær. Sjálvt tá eg ikki vil, at hann skal.

Men í morgun klagi eg ikki. Eg rætti hondina upp í loft og síggi hana klárt og týðiliga uppiyvir mær. Hon er ikki fjald ella óklár. Við hondini aftur í lummanum gangi eg longri oman til myrkabláa havið. Bylgjurnar bera lætta gulliga ljósið frá tí einsamalla lyktapelanum við sær í hvørjari rørslu. Ljósið verður brotið sundur og drigið saman aftur fleiri ferðir, allastaðni í senn. Ljósið í vatninum lýsir næstan bjartari enn ljósið frá lyktapelanum. Onkuntíð havi eg hug at knúsa peruna, bara so eg kann sita í fullkomnum myrkri eina løtu. Úti.

Tað er ikki tað sama í myrka kamarinum. Har lukti eg ikki saltið, og heita innilæsta luftin følist ikki líka frísk í bringuni. Hon prikar ikki.

Tað einasta, mær ikki dámar, er, at tað ikki einans eri eg, sum eri her. Eg veit ongantíð nær ein gamal abbi ella dippikona koma gangandi við vónum um at síggja sólarrisið. Eg hoyri ofta bilar ella bátar langt burturi, ella haldi eg meg hoyra hjól á barnavognum draga regndropar eftir vegnum aftan fyri meg. Tá vendi eg við og gangi eftir lítlu gøtuni, ið liggur niðri við havið, og fari heldur heim í song aftur.

Í morgun hoyri eg einans aldur. Nakrar likkur eru vaknar og skeldast langt burturi, men tað er eitt vælkomið ljóð. Hvat skeldast tær soleiðis um? Eru tær nakrantíð nøgdar? Finna tær nokk at eta í einum sovorðnum menniskjabýi? Eg vildi ynskt, at eg var ein likka.

Um eg var ein likka, hevði eg andað køldu, kláru luftina djúpt niður í lunguni hvønn dag. Eg hevði verið vakin langt út á kvøldið, ella farið tíðliga upp, áðrenn øll fólkini vaknaðu. Eg

hevði eygleitt tey, uttan at tey høvdu hugsað um meg. Eg kundi sitið á húsum og lyktapelum, ella gingið á sandinum, ella sitið beint her, eg siti nú. Men tá hevði eg ikki hugsað um, um okkurt fólk kom. Tí so hevði eg flogið uppeftir og funnið mær eitt annað gott stað. Eg hevði sveimað heilt nær við havið, so frísku droparnir reinsaðu andlitið, so eg varð heilt vakin, og eg hevði flogið heilt upp til fjøllini og sæð øll útsýni, eg vildi. Eg hevði ikki flogið langa túrin yvir um høv og lond um veturin. Tí veturin er besta tíðin at verða verandi her. Tað hevði dámt mær fínt, um allar hinar likkurnar fóru. So hevði eg fingið matin og útsýnið fyri meg sjálva. Eitt annað, eg hevði gjørt, var at vitjað reyðu húsini nummar 13 við endan av vegnum. Tá hevði eg stillað meg á altanina og hugt inn í gulu stovuna. Eg hevði sæð eina gentu sita við borðið, og kanska tá hevði onkur annar sitið har saman við henni. Kanska hevði hon ikki gjørt matin og skúlatingini sjálv, og tey høvdu øll verið saman. Gentan hevur eitt smíl á varrunum, og hon er mett og glað, og hevur havt tíð til alt tað, hon *vil* gera. Familjan reisir seg frá borðinum, og øll seta talerkarnar yvir til vaskið. Eg siti enn eina løtu á altanini og hugsi, at kanska hevði ikki verið so galið at sitið inni í einum heitum húsum. Men tað kann mann ikki, tá man er fuglur. Gentan inni í húsinum sær nøgd og móð út nú og er tann seinasta, sum er vakin. Hon stillar seg í gongina, og áðrenn hon sløkkir ljósið, vendir hon sær á og sær meg. Vit smílast til hvørja aðra, hon sløkkir ljósið, og eg vendi mær á.

Eg flagsi og flagsi við fullari megi, so eg komi skjótt høgt upp. Her er vindur, men tað følist deiligt at rista í fjaðrunum eitt sindur. Eg fari beina leið oman ímóti kaiini við veika gula lyktapelanum. Har stendur eingin genta, tí hon liggur heit undir dýnuni í kamarinum. Hjartað bankar skjótari, tá aldurnar nærkast, men eg seti ikki ferðina niður. Eg gevist nú við at flagsa og spenni veingirnar beint út til síðurnar. Eg sveimi klárt og skjótt ímóti gulu ljósbrotunum, og eitt einkult tár fellur og verður burtur í mjørkanum. Og brádliga verður ísakalt. Við eitt eri eg ikki frí í luftini longur, og alt verður myrkt. Eg vildi aftur ynskt, at eg hevði fjaðrar, sum hitaðu meg nú, men soleiðis er ikki. Eg rúki skjótt niðureftir og føli trýstið í høvdinum, men royni ikki at svimja upp. Her niðri er eitt sindur sum í himmalinum. Her eri eg frí og kann sveima, sum eg vil.